## Vænta onki snarkríggj

**Flestu føroyingar vænta, at kríggið í Irak fer at taka upp í tríggjar mánaðir. Amerikanarar eru meira bjartskygdir og vænta eitt snarkríggj**

KANNING
*Ingi Rasmussen*

Herdeildirnar hjá USA og teimum sameindu hava møtt óvæntaðari harðari mótstøðu á sínari ferð ímóti høvuðsstaðnum Bagdad í Irak. Ætlanin var upprunaliga, at Saddam Hussain og hansara harkalið varð sett frá valdinum eftir nøkrum fáum døgum. Men roknað verður ikki longur við einum snarkríggi.

Tað vænta føroyingar heldur ikki, vísir ein spurnakanning hjá Gallup Føroyum. 54% av teimum spurdu meta, at kríggið fer at taka upp í tríggjar mánaðir. Heili 20% vænta, at kríggið fer at taka millum fýra og seks mánaðir. 6% vænta at tað tekur upp í eitt ár, og onnur 6% vænta, at tað fer at taka meira enn eitt ár.

Bara 10 prosent vænta, at kríggið, sum nú er á 13. degi, fer at taka minni enn ein mánað.

Tá eru amerikanarar meiri bjartskygdir. Heili 27% væntaðu, at kríggið fór at vera liðugt, áðrenn tann fyrstu mánaðin var farin. 34% væntaðu, at tað fóru at taka millum ein og tríggjar mánaðir, tá teir vórðu spurdir fyri viku síðani. Men síðan tá, er longu nógv hent, sum kann hava fingið teir at broytt støðu, og tí kunnu tølini illa samanberast.

# Føroyingar ivingasamir um álop á Irak

**Føroyingar eru tvíbýttir í spurninginum um kríggið á Irak. Fleiri stuðla krígnum hjá USA enn eru ímóti. Annar hvør føroyingar tekur undir við krígnum, men samstundis halda fleiri enn helvtin av teimum spurdu, at álopið av Irak skuldi verið góðkent av ST fyrst**

KANNING
*Ingi Rasmussen*



*Øll eru ímóti ræðuleikunum frá einum kríggi, men kortini heldur helvtin av føroyingum tað vera rætt, at USA leyp á Irak. Føroyingar høvdu hinvegin ynskt, at ein samdur heimur stóð aftan fyri tiltakið at seta Saddam Hussain frá*
*Mynd: Reuter*

Annar hvør føroyingar tekur undir við, at USA og tess sameindu lupu á Irak. Tað vísir ein kanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Sosialin. 502 føroyingar yvir 15 ár vóru spurdir í døgunum 27. til 30. mars, og yvirhøvur má sigast, at tey, sum taka undir við krígnum eru fleiri enn tey, sum eru ímóti.

Av teimum spurdu taka 50% undir við, at USA og Bretland lupu á Irak uttan spyrja ST eftir. 36% siga seg vera ímóti, og heili 14% siga seg ikki vita.

Sostatt eru føroyingar meiri krígshugaðir, enn okkara grannar hava verið í líknandi kanningum. Men hinvegin eru føroyingar ikki so eldhugaðir at loypa á, sum amerikanarar. Somu spurningar eru settir í USA 22. og 23. mars, og har yviri svaraðu 72%, at tey taka undir við krígnum. 25% søgdu seg vera ímóti og bert 3% vistu ikki.

### Fyri samtykt

Løgtingið hevur annars samtykt við stórum meiriluta, at øll tiltøk ímóti Irak skuldu góðkennast av Sameindu tjóðum fyrst. 19 tingmenn atkvøddu fyri, og bara 9 atkvøddu ímóti. Og tí kundi verið líkt til, at samsvar er ikki millum løgtingið og føroyska fólkið.

Men so er ikki. Tí hóast helvtin av føroyingum taka undir við krígnum, so tekur meira enn helvtin av teimum spurdu samstundis undir við kravinum hjá løgtinginum. 57% av føroyingum taka undir við samtyktini hjá Føroya løgtingi um, at hernaðarlig tiltøk til tess av fáa Irak at ganga undir ST-samtyktir skulu góðkennast av ST. 28% siga nei og 15% vita ikki.

Sostatt tykjast føroyingar at halda, at tað hevði verið best, um ST góðkendi kríggið, men tá tað eftir øllum ikki lat seg gera, var neyðugt, at USA og Bretland tóku um endan.

### Ójavnir flokkar

Ógvuliga ójavnt er, hvussu veljararnir hjá ymisku flokkunum taka undir við politikkinum hjá sínum flokki. Talan tykist eisini í hesum føri at vera eitt »bæði og«.

Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin søgdu allir nærum einmælt, at øll tiltøk ímóti Saddam Hussain skuldu góðtakast av ST. Fólkaflokkurin og Miðflokkurin vóru ímóti. Veljarin tykist meira ivasamur.

Til dømis taka 55% av fólkafloksveljarunum undir við, at USA leyp á, men akkurát líka nógv, sum valdu Fólkaflokkin seinast, siga at álopið skuldi verið góðkent av ST.

Nøkunlunda somu tøl eru fyri Sambandsflokkin. 53% styðja álopið á Irak, men 55 prosent siga samstundis, at tað skuldi verið góðkent av ST fyrst.

Eitt sindur greiðari tala fæst í Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum. Í Javnaðarflokkinum siga 46% seg taka undir álopinum, men 58% siga, at tað skuldi verið góðkent av ST fyrst. 50% av tjóðveldisveljarum taka undir við álopinum, men 64% halda, at tað skuldi fingið stuðul frá ST.

### Í serstøðu

Í Miðflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum eru tølini smá, men talan er hinvegin greið.

Serliga Miðflokkurin stingur seg burturúr. 67% av veljarunum hjá Miðflokkinum styðja treytaleyst álopið á Irak og bara 21% eru ímóti , men 45% høvdu kortini ynskt, at ST tók undir við álopinum.

Í Sjálvstýrisflokkinum sigur annarhvør veljari, at kríggið er í lagi, men heili 72% høvdu heldur sæð, at ST førdi kríggið ímóti Irak.

## Fólk fylgja væl við

**Føroyingar fylgja væl við krígnum, vísir Gallup-kanning. 65% siga seg fylgja væl ella sera væl við í tí, sum fyriferst í Irak**

KANNING
*Ingi Rasmussen*

Allar tíðindarásir við virðing fyri sær sjálvari senda beinleiðis frá krígnum í Irak alt samdøgrið á tamb.

Føroyingar hava nógvar rásir í at velja, og tann fjórðingurin, sum bara hevur SvF at líta á, kann ugga seg við, at sjónvarpið samsendir við BBC, tá onki annað er á skránni.

Sostatt er ríkiligt høvi hjá føroyingum at fylgja við krígnum hjá USA og tess sameindu ímóti Irak, sum nú gongur á 13. degi. Og líkt er til, at føroyingar taka av.

65% av teimum 502 fólkunum, sum Gallup Føroyar spurdi um vikuskiftið, siga at tey fylgdu sera væl ella væl við krígnum í Persaraflógvanum. 18% fylgja »sera væl« við og 47% fylgja »væl« við. 31% fylgja »ikki so væl« við og bara 4% fylgja »als ikki« við.

Um tað er nógv ella lítið, veldst um eygað, sum sær, men tað er fyri lítið at rokna ímóti USA.

Í USA fylgja 95% væl ella sera væl við teirra hermonnum í Irak, vísir ein kanning, sum varð gjørd 22. og 23. mars. Heili 63% amerikanarar siga seg fylgja sera væl við. Bara 4% fylgja ikki so væl við, og einans 1% fylgir als ikki við.










